# kkum sjálvi

Føroyum. Og fólk sum fíggjarmálaráðharrin og hansara fólk kunnu seta seg í samband við.

Hvussu sær Graham Steward Føroyaøkið komandi árini!

Her er ein sera spennandi framtíð og ikki minst eftir fundið hjá Chevron beint við markið. Hetta er eitt av teimum størstu feløgunum í heiminum. ´Teir leggja nógv í hetta fundið. Eisini stór feløg sum Shell og Statoil eru við. Fleiri av feløgunum hava sett sera nógv fólk at arbeiða við økinum. So tað sær bjart út.

Graham sigur, at Føroya Kolvetni er eisini virkið í Freyu, sum eisini liggur nær við Laggan gassfeltið, sum nú verður bygt út. Clair er annars sera tydningarmikið fyri føroyska felagið, tí tað liggur bert 10 kilometrar frá Freyustrukturin og verður í løtuni tosað um at samstarva um at bora og menna Freyu.

Hvat viðvíkur loyvunum hjá Faroe Petroleum á føroyska landgrunninum, so skulu tey taka støðu til, um borast skal innan trý ár. Tað er tí neyðugt longu nú at vera úti um seg at fáa boripallar. Annars er áhugi hjá øðrum feløgum at vera við í loyvum hjá Faroe



*Tvær væl hýrdir bankastjórar frá Føroya Banka og Føroya Sparikassa vóru við frá byrjan til enda og fingu nógv burtur úr*

økinum, og er farið at skjóta seimsikk í loyvi 9 og um ein mánað verður skotið á Wyville Thomsen rygginum.

Teir hava so eisini skotið seismikk yvir Freyuøkið, sum liggur beint norðan fyri risa oljufeltið Clair. Vit hava stórar vónir til

Petroleum. Nøkur stór og smá feløg eru hugað fyri at farma inn. Men teir eru so ikki enn farnir undir veruliga marknaðarføring av loyvunum og siga tí við áhuga feløgum, at tey kunnu koma aftur í september.





*Joe Darby, nevndarformaður í Faroe Petroleym og Graham Steward, stjóri*

Joe Darby, nevndarformaður í Faroe Petroleum:

# – Lærið av okkum

**– Stórur áhugi er fyri at seta pengar í leiting við Føroyar. Tað er tí, at hetta er eitt ókannað øki. Tí eru tað eftir okkara meting stórir møguleikar at gera fund her og meta vit goymslurnar at vera stórar. Vit meta eisini, at her kunnu gerast sera stór fund. Tí eru eisini fleiri av okkara samstarvsfeløgum stór oljufeløg sigur nevndarformaðurin í Faroe Petroleum, sum heldur, at onnur føroysk feløg eisini kunnu læra av teirra royndum**

OLJUFUNDUR Í LONDON
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Joe Darby er ikki hvør sum helst í altjóða oljuhøpi. Var stjóri í tí stóra oljufelagnum Lasmo, sum nøkur ár herfyri varð keypt upp av øðrum oljufelag. Hann var staddur í London, tá føroyska sendistovan skipaði fyri stóra tiltakinum har.

– Vit eru við búna okkara loyvi á føroyska landgrunninum og eru farnir undir at skjóta seismikk við tí fyri eygað at finna hóskandi leiðir at kanna nærri og vónandi eisini seta borin í einaferð í framtíðini. Vit eru sera vónríkir, tí vit halda okkum hava fingið tillutað sera góð loyvi. So vit halda, at tað, sum okkara lítla felag hevur megnað, vanliga er nakað, sum er eyðkenni fyri eitt stórt oljufelag. Tvs. at hava fingið tillutað so nógv góð loyvi. Eg eri sera nøgdur við arbeiðið higartil og ikki minst við okkara starvsfólk.

Joe Darby, sum er sera væl kunnugur við Føroyar og føroysku oljutilgongdina frá tíðini, tá Lasmo varð partur av leitingini, heldur fyri, at teirra fyrsti brunnur verður helst boraður í 2006 ella 2007, í loyvi 5, sum liggur tætt upp at markinum móti Bretlandi. Nærhendis er gjørt eitt sera væleydnað fund, nevnt Cambo, júst hinumegin markið. Hetta feltið líkist ikki sørt teirra egna Ann Maria prospek í loyvi 5 á føroyska landgrunninum. Føroya Kolvetni stendur fyri 25% av hesum loyvinum, meðan ENI hevur 75%. Sosialurin hevur annars skilt, at føroyska felagið hevur verið í samráðingum við ENI at taka yvir tess part av loyvinum. Málið sigst liggja í Vinnumálaráðnum til góðkenningar.

Joe Darby sigur annars, at Faroe Petroleum hevur ikki bundið seg til at bora ein brunn í hesum loyvinum. Komandi kanningar skulu tí vísa, um man ætlar sær at bora ella ikki.

### Góð fólk avgerandi

Vit spurdu bretska oljumannin, hvat er svarið til successina hjá Faroe Petroleum, sum bæði hevur megnað at fáa so nógv góð loyvi og fáa so nógvar útlendskar íleggjarar?

– Tað er avgerandi at hava eitt lið av góðum og vitandi fólkum og síðani eisini tey góðu sambond, sum hesi fólk hava skapt ikki bert við føroyskar myndugleikar, men eisini við onnur og stór oljufeløg, sum arbeiða í økinum.

– Men hvussu ber tað til, at so nógvir íleggjarar vilja seta pening sín í leiting í einum so óvissum øki sum tí føroyska?

– Tað er tí, at hetta er eitt ókannað øki. Tí eru tað eftir okkara meting stórir møguleikar at gera fund her og meta vit goymslurnar at vera stórar. Vit meta eisini, at her kunnu gerast sera stór fund. Tí eru eisini fleiri av okkara samstarvsfeløgum stór oljufeløg.

Joe Darby sigur annars, at Faroe Petroleum er tað fyrsta og fremsta føroyska felagið, sum hevur tikið stigið til at fáa útlendskar íleggjarar til at seta pening í eitt føroyskt felag. -Eg vóni, at tit sum eru komin saman her í London leggja tykkum hetta í geyma og eisini siga øðrum frá hesum møguleikum. At tit læra av okkara royndum, tí er talan um eitt gott felag við góðum fólkum og møgleikum, so stendur fíggingarmarknaðurin í London opin fyri tykkum.



*Joe Darby frá Faroe Petroleum tosar við Åke Hesselbrom, stjóri hjá Mærsk Olie og Gas. Áhugavert at vita, hvat teir báðir tosa um!*